


STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur/byggifrøðingur til framleiðsludeildina [Endurlýsing]

Søkt verður eftir verkfrøðingi/byggifrøðingi ella líknandi til framleiðsludeildina á Landsverki. Framleiðsludeildin hevur asfalt- og skervverkini og maskindeildina um hendi. Nýggja starvsfólkið fer at hava mest við asfaltverkið og útlegging av asfalti at gera, herímillum at leggja asfaltarbeiði til rættis. Fýra skervverk eru kring landið: í Hundsarabotni, í Porkeri, á Hústoft og á Sandi. Bitumengoymsla er í Hósvík. Asfaltframleiðslan er í Hundsarabotni.

**Arbeiðsuppgávur**
Høvuðsuppgávurnar eru tilrættislegging o.a. í sambandi við framleiðslu og útlegging av asfalti, umframt góðskustýring innan virksemið á deildini. Tann, ið fær starvið, kann eisini rokna við at arbeiða við øðrum uppgávum á stovninum. Fasta tilhaldið verður á skrivstovuni í Havn.

**Førleikakrøv**
Tú hevur útbúgving sum verkfrøðingur/byggifrøðingur ella líkandi ástøðiliga útbúgving og hevur góðan kt-kunnleika. Fyrimunur er eisini at hava royndir við asfaltframleiðslu, tó at hetta ikki er krav. Rætti persónurin við áhuga fyri at seta seg inn í nevnda virkisøkið fær møguleika at menna seg á hesum øki og fær viðkomandi upplæring.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívsgongdarlýsing (cv) og møguligum ummælum skulu sendast til:
Landsverk,
Postboks 78,
110 Tórshavn,

og skulu vera skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 23. juni, 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Torkil Olsen, deildarleiðara, á tlf. 540 841 ella á to@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*









**ProTools HD í Studio Pegasus, Klaksvík, er til sølu.**



- ProTools HD v/fleiri góðum plug-ins
- Mac-telda
- og annað hardware

Ring 456500 ella maila til alvin@ras2.fo og fá meir at vita.

**STUDIO PEGASUS** tlf 456500